**Matrikulstovan**
Jónas Broncksgøta 27
Postboks 327, FR-110 Tórshavn
Telef. 14533 - telefax 10408
Avgreiðslutíð: 10-12 / 13-15

M. j. nr. 41-33-28
(at tilskila í svari)

oc/ 28. 5. 1996

Sorinskrivarin
postrúm 28
110 Tórshavn

Við góðkenningarskrivi dagfest 18. des. 1994 er eigindómurin í Mykinesi umskipaður sum úrslit av innangarðsútskifting.

Í hesum góðkenningarskrivi vórðu samanleggingar framdar av eigindómum, ið sami eigari átti. Matr. nr. 58 og 59 vórðu eisini løgd saman, og sambært gerðabókina pag 561-562 er hetta gjørt tí:
"Í skrivi dagfest 13. juli 1993 hevur Árni Joensen gjørt vart við, at "Lauritsartrøð". matr. nr. 59 er skeivt skrásett við tað, at abbi hansara Laurits Joensen hevur keypt trøðna, og vísir hann til ognarbræv frá "Landbrugsrådet på Færøerne" dagfest 4. apríl 1949 og skjal, ið vísir, at ognarparturin í Líðarhaga hevur avhendað trøðna. Tann 26. august 1993 hevur hagastýrið fyri Líðarhaga váttað, at arvingarnir eftir Laurits Joensen fáa trøðna við teimum ásetingum, sum nevndar eru í skjalinum frá "Landbrugsrådet"."

Av tí at ivi er um lógarheimild fyri hesi broyting, verður matrikulin broyttur soleiðis, at Lauritsartrøð aftur verður skrásett sum matr. nr. 59:

| | |
|---|---|
| Matr. nr. 58, eigari: | Joensen's arv., John, Tórshavn<br>Joensen, Adela Skel, Tórshavn<br>uttangarðs: 1 gl Heimangjógv, matr. nr. 171<br>innangarðs vídd: 586 m2 |
| Matr. nr. 59, eigari: | Joensen's arv., John, Tórshavn<br>Joensen, Adela Skel, Tórshavn<br>innangarðs: vídd 7238 m2 |

Hetta verður gjørt kunnugt.

Hjálagt verður sent kopi av skjøti frá "Landbrugsraadet" og skjali frá óðalseigarunum í Líðarhaga.

Ó. CLEMENTSEN
matrikulstjóri